

## Stuðul úr JÓLAMERKJAGRUNNINUM

Sambært reglugerð fyri Jólamerkjagrunnin (Føroya Landsstýri, nr. 92 frá 5. desember 1979) hevur grunnurin til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Postverk Føroya gevur út á hvørjum ári. Ágóðin verður býttur út sum stuðul til ávís tiltøk til frama fyri børn, til stovnar, feløg o.o., ið virka fyri hesum tiltøkum.

Í serligum føri kann stuðul verða latin til annað enn ávís tiltøk til frama fyri ungdóm, brekað ella onnur samfelagsgagnlig endamál.

Seinnu árini hevur grunnurin á hvørjum ári latið um 500.000 - 600.000 kr. til ymisk vælgerandi endamál.

Síðan 1976 eru knappar 16 mió. kr. latnar í stuðli úr grunninum.

Eitt trímannastýri hevur um hendi leiðslu grunsins og ger av, hvussu ágóðin verður býttur.

Stýrið er ikki bundið av, at umsókn er send, men umsóknir um stuðul úr Jólamerkjagrunninum í ár kunnu sendast grunninum í seinasta lagi 10. desember 2004 og skulu stílast til:




Jólamerkjagrunnurin
c/o Postverksstjórin
Postsmoga 3009
110 Tórshavn





Nú er hon klár
**Stavanger-flúgvingin**
Galdandi 11.01.2005 til 23.03.2005

**Úr Føroyum:** Frá 11. januar til 22. mars hvørt týskvøld kl. 18:00

**Úr Stavanger:** Frá 12. januar til 23. mars hvørt mikukvøld kl. 20:40

Ferðaseðlar kunnu keypast hjá Atlantic Airways á 34 10 10 og á atlantic.fo ella hjá tínari ferðaskrivstovu.

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo



Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i





*Ein mest sum gandað bók við myndum, ið broytast, og ein frásøgn um Likkulinu og Likkudemus eru millum bókurnar, sum Bókaklubbin hesaferð hevur sent limum sínum*

# Fýra nýggjar bøkur til børn og ung

Bókaklubbin hjá Føroya Lærarafelag hevur aftur latið fýra nýggjar bøkur til limirnar í ymsu bókaklubbunum.

Til tey yngstu er talan hesaferð um eina bók við holografiskum myndum, sum broytast, alt eftir hvussu bókin verður riðað. Bókin eitur »Góða nátt, Góðan morgun«.

Maud Heinesen hevur skrivað bókina um Likkulinu og Likku-demus, ið er ein søga um likkkurar, sum omman og lítli Jens Pauli geva at eta. Um teir báðar vinmenninar, sum fara úr barnagarðinum, uttan at nakar veit av, og um ommuna og abban, sum síggja likkurnar aftur í einum heilt øðrum landi. Hanna Bjartalíð hevur gjørt myndirnar til bókina.

»Lokki Litaval« er úrval av yrkingum hjá Aleksandur Kristiansen. Millum annað kann lesast um listarligu kúnna, um svartaklukkuna Sáru og um Salvador í Dali. Bárður Jákupsson hevur myndprýtt bókina.

Seinasta bókin hesaferð er »Skammartekn-ið«, sum er ætlað teim-um heldur størru børn-unum. Talan er um næstu bókina í røðini um Skammaran, har stríð er millum Skammaran og Drakan. Hesaferð verður Dina tikin og brúkt av óndum kreftum, og Dav-in roynir at hevda seg, tí hann ikki hevur somu evni sum mamman og Dina.

-jm


**VARPIÐ**

Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



An international study programme at the Academy of Higher Education is only a click away!

- Multimedia Designer
- Building Technician
- IT and Electronics Engineer
- Chemical and Biotechnical Analyst

Please visit www.ats.dk for starting dates and further information

Academy of Higher Education
Aarhus Technical College
Denmark





**MARKO ´04**
SØLUSTEVNAN

**Nógvir og góðir framsýnarar:**

Ansni ◆ Basic ◆ Bembla ◆ Bixin ◆ El-Tænastan
Enjo ◆ Esmar Simonsen ◆ Frú S ◆ Harryson's
Hilmar Højgaard ◆ La Femme ◆ LM-Handilin
My Design ◆ Piff Paff Puff ◆ Profa ◆ SD Beding
Sosialurin ◆ Trendzetter ◆ X18 ◆ X-it ◆ Zebra
...umframt kafeteria, NSÍ-bás, tombola og annað

**ÍTRÓTTARHØLLIN Í RUNAVÍK**

ATLANTIC AIRWAYS

**Øll vitjandi kunnu vinna góðar flogferðir fra Atlantic Airways. Drigið verður millum tey seldu atgongumerkini bæði kvøldini!**

**Leygardagin 20. november**

kl. 14.00 Marko '04 letur upp
kl. 15.00 Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, setir Marko '04
kl. 15.30 Nes Sóknar Musikkfelag spælir
kl. 17.15 Sigrun, Sanna & Oda framføra á pallinum
kl. 17.30 Angela & Hannibal undirhalda
kl. 19.00 Mótasýning
kl. 20.30 Sámal & Ronnie syngja
kl. 21.45 Drigið verður millum atgongumerkini leygardagin
*Vinningur: Vikuskiftisferð fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantsflog*
kl. 22.00 Marko '04 letur aftur

**Sunnudagin 21. november**

kl. 15.00 Marko '04 letur upp
kl. 16.00 Næmingar á tónlistabreytini syngja
kl. 17.15 Sigrun, Sanna & Oda framføra á pallinum
kl. 17.30 Angela & Hannibal undirhalda
kl. 19.00 Mótasýning
kl. 20.30 Robert & Hilmar Jan undirhalda
kl. 21.45 Drigið verður millum atgongumerkini báðar dagarnar
*Vinningur: Apex-ferðaseðil fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantsflog*
◆ Eisini verður drigið um stóra NSÍ-lutaseðilin
kl. 22.00 Marko '04 letur aftur

**MARKO ´04**
SØLUSTEVNAN



P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja

CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging



Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo



Lesið Sosialin -so eru tit við!


## Stjóri til Tjóðpall Føroya

**Lýst verður eftir stjóra at seta frá 1. februar 2005 ella skjótast til ber.**

Stjórin kemur at hava listarligu ábyrgdina og skal standa fyri menningini av Tjóðpalli Føroya í samstarvi við leiklista- og mentanarøkið í Føroyum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava visiónir um at menna leiklist í Føroyum og neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri Tjóðpall Føroya.

**Umsøkjarar skulu hava:**
- leiklistarliga útbúgving ella royndir innan leiklist
- leiðslu- og samstarvsevnir
- innlit í fíggjarviðurskifti og fyrisiting

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt samsvarandi 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelagnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Stjóraskeiðið er í mesta lagi 5 ár í senn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, forkvinnu í Leiklistaráðnum á telefon 35 25 04 ella annikas@setur.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til Leiklistaráðið í seinasta lagi 20. desember 2004.

**Leiklistaráðið**
Postrúm 212
FO-110 Tórshavn

att. Annika Sølvará

**Tjóðpallur Føroya er almennur stovnur, skipaður við Løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Játtanin til Tjóðpallin er 2,4 mió kr í 2004.**

**Tjóðpallurin skal sambært lógini**
- í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
- geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari palllist
- tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðsmøguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
- skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
- fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

**Lógarteksturin við viðmerkingum liggur á heimasíðu Løgtingsins:**
www.logting.fo/logtingsmal/logtingsmal02/vanlig%20tingmal/093.02%20tjodpallur%20foeroya.htm